Bólkur 1:

# Toftamenn togaðu seg upp

**Leingi sá svart út, men við tveimum nóg so hepnum málum fingu toftamenn togað seg víðari úr bólkaspælinum, og tað enntá sum besti tvey'arin í kappingini**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*



*Fyri tað nógva høvdu runavíkingar leikliga yvirvág á Toftum, men toftamenn høvdu neyðuga hepnið, og vunnu seg harvið upp á næsta plássið í bólkinum*

Tvørámenn vóru í hesum bólkinum liðið, sum eingin roknaði nakað serligt av, og hetta skuldi fyri tað mesta vísa seg at halda. Verður sæð burtur frá fyrsta dystinum, har teir gjørdu ein vørr móti B68, fekk TB av at vita mest sum hvørja ferð. Eisini í teimum báðum seinastu dystunum, har teir taptu til samans 10-0 móti ávíkavist NSÍ og FS Vágum.

## Hepnir toftamenn

Fyrri ósigurin hevði við sær, at runavíkingarnir tryggjaðu sær fremsta plássið í bólkinum, og soleiðis kundu teir taka sær av løttum, tá teir leiktu seinasta dystin á Toftum.

Tað kundu hinvegin hvørki B86 ella FS Vágar, eftir at tey høvdu leikt málleysan javnleik skírishósdag. Tann javnleikin vóru toftamenn helst fegnari um, tí verður talt upp í málmøguleikum, so er einki at ivast í, at vágamenn vóru omaná ta ferðina. Tað einu ferðina høvdu teir enntá leikt seg inn um málverjan, men Bjarni Prior hevði helst ikki ánilsi av, hvussu góða tíð hann í veruleikanum hevði, og ístaðin smekkaði hann til við síðuna av málinum.

Vóru toftamenn hepnir við einum stigi her, vóru teir ikki minni hepnir við sigrinum á NSÍ í seinasta umfarinum. Nú høvdu runavíkingarnir ikki so nógv annað enn æruna at spæla fyri her, men í slíkum uppgerðum telir hon eisini nógv, og tað vóru eisini gestirnir, sum vóru omaná fyri tað mesta.

Teir løgdu seg eisini á odda við einum máli, sum Jónstein Petersen skeyt eftir uppspæl í høgru, men eftir lítlari løtu í seinna hálvleiki hevði B68 koppað øllum á. Fyrst var Súni Fríði so avgjørt á rætta staðnum, tá hann – helst uttan at vita tað – var millumstøð hjá einum bólti, sum stakk av tvørtrænum, og løtu seinni klossaði Jens Martin Knudsen eitt innlegg frá Jan Inga Petersen í málið.

B68 megnaði at halda fast um leiðsluna, og vunnu teir seg harvið somikið langt upp, at teir endaðu sum besti tvey'arin í bólkaspælinum, og fáa teir harvið heimavøll í fjórðingsfinaluni. Heppið kanska, men hinvegin er hepnið eisini ein dygd, sum fá lið vilja vera fyriuttan.

## Eingin vandi

Á Sevmýru vitjaðu vágamenn, og tó at hetta á pappírinum líktist eini yvirkomuligari uppgávu, so tóku gestirnir sær á ongan hátt av løttum. Lagt varð fyri sum eitt óløgið, og skjótt spurdist eisini úrslit burtur úr hesum. Ruslan, Clayton og Bjarni Prior høvdu undan steðginum skúgvað mest sum allan spenning til viks, og eftir steðgin slapp Jóhannis Joensen at skjóta sítt fyrsta mál á hesum sinni fyri FSV, áðrenn Clayton Soares staðfesti.

Við sigrinum komu vágamenn upp á 10 stig, og við góða málmuninum hjá liðnum, so var heldur ongan tíð stórvegis vandi fyri at missa víðari møguleikan í kappingini, tá teir fyrst høvdu lagt seg á odda suðuri á Tvøroyri.

**Bólkur 1 í tølum:**

FSV-B68 0-0

**NSÍ-TB 5-0 (2-0)**
1-0: Andy Olsen
2-0: Messias Perreira
3-0: Sonni L. Petersen
4-0: Óli Hansen
5-0: Jónstein Petersen

**B68-NSÍ 2-1 (0-1)**
0-1: Jónstein Petersen
1-1: Súni Fríði Joensen
2-1: Jann Ingi Petersen

**TB-FSV 0-5 (0-3)**
0-1: Ruslan Screlea
0-2: Claoyton Soares
0-3: Bjarni Prior
0-4: Jóhannis Joensen
0-5: Clayton Soares



*Vágamenn høvdu lætt spæl móti einum TB-liði, sum fullkomuliga hevur givið skarvin yvir í steypakappingini, og ístaðin tykist hugsa um frammanfyristandandi uppgávuna í aðru deild*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

### Bólkaspælið í kappingini um løgmanssteypið

**Bólkur 1**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 NSÍ | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 17 | 6 | 11 | 12 |
| 2 B68 | 6 | 3 | - | 2 | - | 1 | 13 | 8 | 5 | 11 |
| 3 FSV | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 17 | 8 | 9 | 10 |
| 4 TB | 6 | 0 | - | 1 | - | 5 | 2 | 27 | -25 | 1 |

**Bólkur 2**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 6 | 4 | - | 2 | - | 0 | 18 | 5 | 13 | 14 |
| 2 KÍ | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 11 | 8 | 3 | 10 |
| 3 VB | 6 | 2 | - | 3 | - | 1 | 9 | 7 | 2 | 9 |
| 4 AB | 6 | 0 | - | 0 | - | 6 | 2 | 20 | -18 | 0 |

**Bólkur 3**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 GÍ | 6 | 5 | - | 0 | - | 1 | 14 | 8 | 6 | 15 |
| 2 HB | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 15 | 6 | 9 | 10 |
| 3 B36 | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 11 | 8 | 3 | 10 |
| 4 Skála | 6 | 0 | - | 0 | - | 6 | 6 | 24 | -18 | 0 |



Bólkur 2:

# Gestirnir sendu VB út í myrkrið

**Tveir páskasigrar høvdu við sær, at klaksvíkingar væl og virðiliga megnaðu at spæla seg í fjórðingsfinalu umfarið**

LØGMANSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*

Eftir tveir ósigrar ímóti EB/Streymi og javnleik í Vági tóktist møguleikin hjá KÍ annað árið upp í slag at detta úr steypakappingini eftir bólkaumfarið at vera stórur. Men endaspurturin hjá klaksvíkingum var so mikið góður, at teir í umførunum Skírisdag og 2. Páskadag fingu fult. Harvið bjargaðu teir sær næstfremsta plássið og pláss í lutakastinum til fjórðingsfinaluna.

Um KÍ hevur funnið rætta stevið og harvið er púra klárt til fyrsta umfarið í landskappingini, har teir skulu royna seg í Gøtu, er ein opin spurningur, sum heldur eingin í Klaksvík heldur seg til at svara.

Í fjør megnaði KÍ ikki at vinna landskappingardystin í Klaksvík ímóti VB. Hann endaði málleysur, og tað var ein av stóru orsøkunum til, at KÍ ikki síðstu umførini var við í kappingini um FM heitið.

Skírisdag vóru vágbingar aftur í Klaksvík. Og aftur hesa ferð høvdu teir somu reseptina í viðførinum, sum teir brúktu í landskappingini í fjør. Teir tóku tað heilt rógligt, og teir høvdu bara Birgir Jørgensen á toppinum.

KÍ hevði bóltin mesta partin av tíðini, men kanska var tað framúr góða veðrið, sum legði ein dempara á ferðina í spælinum. Tískil var tað lætt hjá Eyðuni Jacobsen og hansara monnum at byrgja uppfyri.

Klaksvíkingar fingu kortini eitt mál undan steðginum. Símun Joensen var hægstur, tá ið horna varð sent innfyri úr vinstru, og hann stútaði í málið aftanfyri Bjarna Johansen.

Í 2. hálvleiki økti Erling Fles við høvdinum. Málið kom eftir gott álop í høgru, síðuskift og innlegg.

Síðstu løtuna royndi VB at flyta seg longri fram. Næsta teir komu máli var, tá ið Predrag Zivkovic sendi bóltin framvið KÍ málverjanum, men Jan Andreasen vardi við hondini á strikuni. Hann sá reyða kortið, og Karstin Joensen bjargaði royndini hjá Palla Augustinussen úr ellivu metrum. Hetta var triðja ferðin í steypakappingini, at KÍ málverjin vann tvídyst úr ellivu metrum.

Mánadagin var KÍ á Argjum. Talan var á ongan hátt um stórdyst, og liðið var nógv broytt síðani hósdagin. Eyðun Klakstein og Erling Fles vóru fremstir, og teir skoraðu øll málini í 3–0 sigrinum. Tað fyrsta fekk Eyðun, eftir at bólturin varð lyftur inn um verjuna, tað næsta skoraði Erling eftir flatt innlegg úr høgru og til nærra stólpa, og Eyðun staðfesti við stútara, eftir at hann var fyrri enn málverjin, tá ið bólturin varð lagdur inn um verjuna.

Á KÍ liðnum var merkisvert, at Sámal Eyðfinn Akursmørk, sum ikki hevur verið á 1. liði síðani FM árið í 1999, spældi báðar páskadystirnar á tamb.

### Málskjúttar, løgmanssteypið

| | | |
|---|---|---|
| Andrew av Fløtum | HB | 7 |
| Clayton Soares | FSV | 6 |
| Magni á Lakjuni | EB/S | 5 |
| Carsten From | HB | 5 |
| Julian Johnsson | B36 | 4 |
| Sorin Anghel | EB/S | 4 |
| Krzystof Popczynski | GÍ | 4 |
| Sonni L. Petersen | NSÍ | 4 |
| Jákup á Borg | B36 | 3 |
| John Petersen | B36 | 3 |
| Fróði Benjaminsen | B68 | 3 |
| Súni Fríði Johansen | B68 | 3 |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S | 3 |
| Marek Wierzbicki | EB/S | 3 |
| Bjarni Prior | FSV | 3 |
| Hjalgrím Elttør | KÍ | 3 |
| Helgi L. Petersen | NSÍ | 3 |
| Jónstein Petersen | NSÍ | 3 |
| Óli Hansen | NSÍ | 3 |
| Palli Augustinussen | VB | 3 |
| Jens Erik Rasmussen | FSV | 2 |
| Kim Poulsen | FSV | 2 |
| Zdislaw Janik | GÍ | 2 |
| Erling Fles | KÍ | 2 |
| Eyðun Klakstein | KÍ | 2 |
| Ove Nysted | KÍ | 2 |
| Hanus Thorleifsson | Skála | 2 |
| Birgir Jørgensen | VB | 2 |
| Predrag Zivkovic | VB | 2 |



*Klaksvíkingar skaptu sær eitt gott útgangsstøði undan seinasta umfarinum, tá teir skírisdag vunnu 2-0 á VB*
*Mynd: SáH*

## VB misti á stokkinum

EB/Streymur hølvaði hósdagin AB av 7–1 á Mølini. Magni á Lakjuni, Sorin Anghel og Marek Vierzbicki skoraðu tvey mál í part. Marek og Magni fóru av vøllinum í 2. hálvleiki, og Magni var so mikið skaddur, at hann ikki var við í Vági mánadagin.

EB/Streymur hevði frammanundan tryggjað sær fyrsta plássið í bólkinum og harvið heimavøll í fjórðingsfinaluni. VB hevði knívin á strúpanum, og teir vóru leingi væl grammari enn mótstøðumenninir.

Predrag Zivkovic legði heimaliðið á odda í 1. hálvleiki, og tá ið Birgir Jørgensen beinanvegin eftir steðgin økti til 2–0, tóktist alt benda á, at VB skuldi vinna øll stigini og harvið bjarga sær pláss í fjórðingsfinaluni. Men soleiðis tørnaði tað ikki út.

Vinjard Dam minkaði um munin, tá ið tað restaðu níggju minuttir, og við síðsta sparkinum av øllum á Vágseiði 2. Páskadag syrgdi miðvallarin Hans Pauli Samuelsen fyri javnleiki. Harvið var greitt, at tað var B36 og ikki VB, sum skuldi halda fram í steypakappingini.

<u>Skírisdag</u>
**KÍ–VB 2–0 (1–0)**
1–0: Símun Joenen
2–0: Erling Fles

**EB/Streymur–AB 7–1 (5–1)**
1–0: Ronnie Samuelsen 5.
2–0: Magni á Lakjuni 10.
3–0: Magni á Lakjuni 12.
3–1: Johnnie Samuelsen 21.
4–1: Sorin Anghel 32.
5–1: Sorin Anghel 37.
6–1: Marek Vierzbicki 65.
7–1: Marek Vierzbicki 78.

<u>2. Páskadag</u>
**AB–KÍ 0–3 (0–2)**
0–1: Eyðun Klakstein
0–2: Erling Fles
0–3: Eyðun Klakstein

**VB–EB/Streymur 2–2**
1–0: Predrag Zivkovic
2–0: Birgir Jørgensen
2–1: Vinjard Dam
2–2: Hans Pauli Samuelsen